# »Keep a child alive« konsert í Fuglafirði

**Fríggjakvøldið 19. mars var konsert í Mentunarhúsinum í Fuglafirði. Konsertin var partur av fesitvalinum „Keep a child alive", ið verður hildin í yvir 40 londum.**

UMMÆLI
*Andreas Dalsgaard*
*andreasbacon@hotmail.com*


*Speaker var ein av bólkunum, sum var á pallinum fríggjakvøldið*

Bólkarnir, sum spældu fríggjakvøldið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, vóru Paradox, Speaker, 48 Pages, Sic og Dejavu. Bólkurin, sum byrjaði konsertina, var Paradox, sum eru nakrir ungir knassar, ið halda til á Margarinfabrikkuni. Paradox byrjaðu við lagnum „Basket case" hjá Green Day, ið er eitt heilt ígjøgnum punk lag við nógvum futti í, og mær dámdi næstan betur lagið, tá Paradox spældu tað enn Green Day! Síðani spældu teir løg hjá til dømis Black Sabbath og Rage against the Machine. Lagið mær dámdi best var heilt klárt „Guerilla Radio" hjá Rage against the Machine, sum bara rokkaði totalt. Sangarin, sum eisini spældi guitar, hóskaði ógvuliga væl til tónleikin teir spældu, og sang bara orduliga feitt! Hann dugdi eisini ógvuliga væl at spæla guitar, og spældi nógvar feitar soloir! Bassisturin var eisini sera dugnaligur og rokkaði totalt út! Trummarin var bara heilt svakur og rokkaði eisini orduliga, meðan hárið flaksaði runt! Men hevði tó lyndi til at gera ov nógvar rullir við „snare" trummuni, men annars, heilt feitt. Man skal eisini hava í huga, at teir eru rættuliga ungir, men Paradox var simpulthen rokk fyri allar pengarnar!

## Speaker

Næsti bólkurin sum fór á pallin, var nú vælkendi Speaker, sum hava spælt nógvar konsertir saman við 48 Pages seinastu tíðina, av tí at teir skulu til Íslands. Teir framførdu seks egin løg og byrjaðu við lagnum „ A baker,s dream", sum ljóðaði heilt feitt, men hevur ljóðað betur fyrr, tí tað var ikki nóg hart! Men spældu síðani lagið „between us", sum var mítt yndislag á allari konsertini! Eitt feitt lag við einari feitari rútmu, og so koyrdi tað bara! So spældu teir vælkenda „Jealous song", sum er ein deiligur pop sangur! Og eg visti ikki, at Bogi Berg, guitaristurin, dugdi so væl at dansa. Teir endaðu við einum orduligum 80,ara lagi við langum soloum og stórum trummum, um man so kann siga. Speaker var mín yndisbólkur fríggjakvøldið, og er næstan mín yndisbólkur yvirhøvur, vil eg siga!

## 48 Pages

Triði bólkurin, sum fór á pallin var 48 Pages, sum er rættuliga nýggjur bólkur. Teir framførdu sjey løg, og hava gjørt øll sjálvir. Nevnast kunnu til dømis: „Nr 1" (sum bleiv spældur fyrst), „Simmana", „Irish wimp" og „Going solo". Eisini spældu teir eitt lag sum æt „Valentines", sum var orduliga funky, hevði eina góða rútmu, ljóðaði ógvuliga væl og við eitt sindur av spunky smakki í eisini, ein sera góð kombinatión! Legði serliga til merkis hvussu ógvuliga góður trummarin, Eyðun, var. Hann minti meg um Travis Barker úr Blink 182, tá hann spælir trummur, hárið hjálpti kanska eitt sindur uppá tað, men tað má eg siga er eitt gott kompliment at fáa, tí Travis er bara ein av feitastu trummarunum, sum eru!

Sangarin, Frans, helt eg sang væl, men eg helt tó at hann kundi variera tað, sum hann sang, eitt sindur meir.

Um endan av teirra framførslu hendi eitt lítið óhapp, stólurin hjá Eydun fór um koll, hann steðgaði ikki, men spældi víðari standandi uppi restina av síðsta lagnum! Herðaklapp til tað! Annars helt eg hetta var besta framførslan eg havi hoyrt hjá 48 Pages higartil.


*Frans guitarspælari og sangari í 48 Pages*

## SIC

Fjórði bólkurin sum fór á pallin var eysturoyarbólkurin SIC. Teir framførdu sjey løg, og tvey av teimum vóru cover løg. „Roots bloody roots" hjá Sepultura og „Ya,ll want a single" hjá Korn. Men hini fimm hava teir sjálvir gjørt. SIC er bara baskandi heavy tónleikur so tað rennur eftir úr! Serliga væl dámdi mær sangaran, Mikkjal, sum er fyrrverandi sangari í Krit. Ein heilt ótrúlig rødd hann hevur at skrála við og hóskar ónatúrliga væl til harða tóleikin! SIC var heilt sikkurt bólkurin, sum fekk fólkið út á gólvið. Og eg vil siga, at teir eisini høvdu besta ljóðið á allari konsertini. Best dámdi mær lagið: „Ya,ll want a single". Eitt ógvuliga feitt lag við feitum skiftingum í og tað sum má til, sjálvandi ein feit rútma! Annars kundi tað vera eitt sindur ov langdrigið í onkrum løgum, um man ikki er akkurát til hatta slagið at tónleiki. Ein væleydnað framførsla hjá SIC vildi eg sagt!

## Dejavu

Fimti og síðsti bólkurin á pallinum var vælkendu Dejavu. „og so um til kærleiks pallin" segði ein vissur maður á Frix Føroyum í 2003! Ja tað er nokk rætt sagt. Dejavu var júst rætti bólkurin at spæla síðst! So kundi man líkasum hvíla oyruni aftaná harðan heavy tónleik. Orduliga deiligt at hoyra lekran og friðarligan tónleik áðrenn man fór heim (um man also ikki var til diskotekið aftaná). „Take a look" var ein av løgnum teir spældu og var nokk tað mær dámdi best. Teir spældu tað friðarligari enn teir plaga í byrjani og so eitt sindur harðari móti endanum av lagnum, og tað ljóðaði ótrúliga gott! Tað er langt síðani eg havi hoyrt so lekran live tónleik. So um tú leitar eftir tónleiki til eitt hugnaligt kvøld... ja so er Dejavu júst tað tú leitar eftir!

## Væleydnað

Alt í alt eitt sera væleydnað kvøld í Mentunarhúsinum, men kanska eitt sindur ov nógv „tónleikur afturvið sodavatni og práti" og ikki umvent. Og tað vísur bara, hvussu stórur tørvur er á einum ordiligum konserthúsi, sum bara hevur við tónleik at gera. Men tað sum er gott við Mentunarhúsinum er, at prát og sitipláss eru longri afturi í hølinum, næstan sum eitt høli fyri seg, so man hoyrur tað ikki um man stendur fremst við pallin, men um man stendur aftarliga, leggur man væl merki til tað. Men sum sagt væleydnað konsert!




*Her stendur nýggi Smyril enn uppi á turrum. Í bakborði er spanska flaggið, í stýriborði tað andalusiska og í miðjuni tað føroyska*


*Prestur, næstytst til høgru, signar skipið*


*Her er hann so á veg á sjógv*


*Her liggur hann so uttan fyri Skipasmiðjuna*

# Gongur sum ætlað við nýggja Smyrli

**Í morgin skal nýggi Smyril sleipast yvir á eina aðra skipasmiðju, har yvirbygningurin skal setast á hann**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Sum sagt í Sosialinum í gjár, varð nýggi Smyril flotaður seinnapartin leygardagin. Sum myndirnar vístu, gekk tað sum ætlað at flota skrokkin. Men vit halda, at hetta er so mikið stór hending fyri samferðsluna í Føroyum, at vit nakrar myndir afturat í blaðið í dag av nýggja Smyrli.

Magnus Magnussen, tekniskur stjóri á Skipasmiðjuni, sigur, at tað skuldu stórar fyrireikingar til, áðrenn Smyril kundi flotast.

Skrokkurin stóð ikki á bedingsvogni við hjólum undir, sum vit eru von við.

Hann varð lyftur upp á eina sletu, sum varð væl smurd inn í feitti og tá ið endin varð sleptur, gleið á hann á feittinum á sjógv við egnari tyngdarmegi.

Men sum tað sæst, er hann væl stívaður av fyri ikki at koppa, men nú skal øll avstívingin skerast av aftur.

Magnus Magnussen sigur, at tað gekk akkurát sum ætlað og nýggi smyril flýtur akkurát sum hann skal.

Í morgin er so ætlanin at sleipa skrokkin yvir á eina aðra skipasmiðju hjá sama samtakið. Hendan skipasmiðjan er einar tríggjar fjórðingar frá hesari.

Har skal so yvirbygningurin setast á hann, eins og kømur og øll innrætting eisini skal setast í. Har skulu eisini akslar og róður setast í

Tekniski stjórin á Skipasmiðjuni sigur, at í summar er ætlanin at royna tær ymsu skipanirnar, sum eru umborð og í september er ætlanin at royndarsigla nýggja Smyril.

Tað hevur altíð verið ætlanin at nýgggi Smyril skal handast føroyingum 12. oktober og Magnus Magnussen sigur, at enn er onki, sum bendir á, at tað verður broytt, hóast hann nú er farin at ´sjógv eitt sindur seinni enn ætlað.

– Men her arbeiða eini 1.000 fólk á skipasmiðjuni, og koma ábendingar um, at tíðarætlanin ikki heldur, ber til at seta meiri ferð á, sigur hann.


*Her er hann bundin við bryggju*


*Her eru gumman, Una Joensen, Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, stjórin á skipasmiðjuni og prestur uppi í torninum, tá ið nýggi Smyril varð signaður*